# Vónbrot hjá Atla og teimum

Tað kom púra óvart á teir í Frem, at teir skuldu tapa dystin ímóti botnliðnum Skive í seinasta dystinum fyri vetrarsteðgin. Frem var favorittur og hevði brúk fyri trimum stigum, men Skive skoraði tvey mál seint í dystinm og vann harvið dystin. Føroyski landsliðsspælarin Atli Danielsen spældi allan dystin á miðvøllinum hjá Frem. Nú 15 umfør eru spæld í donsku 1. deild, liggur Frem sum nummar 14 í deildini – fimm stig frá niðurflytigarstrikuni.



# Claus spældi heilan dyst

Enska 1. Deildarfelagið Blackpool spældi leygardagin ímóti Scunthorpe, og hesaferð var fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen á vøllinum frá byrjan. Claus hevur sitið nógv uttanfyri, men nú vóru aftur boð eftir honum, og hann spældi allan dystin. Claus hevði eina góða roynd í seinna hálvleiki, sum var um at geva mál. Eitt mál kom í dystinum, og tað fekk Blackpool eftir hornaspark, tá ið tað restaði stívliga eitt korter.

VÍF-Neistin 20-23 (9-13):

# Tær ungu bitu frá sær

**Hóast VÍF enn er á aftasta plássinum í Sunset-deildini, so prógvaðu fleiri av yngru spælarunum, at tær væl kunnu verða botnurin undir einum nýggjum gull-liði**

HONDDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað gekk strilitið hjá Neistanum móti ungu vestmannakvinnunum. Men tá mest stóð á, vóru tær bláu tó neyvari*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað kann væl verða, at VÍF enn ikki hevur eitt lið, sum er ført fyri at endurtaka gyltu árini fyrst í hesi øldini, tá liðið var at kalla einaráðandi í kvinnudeildini. Til tað er mannfallið eisini ov stórt, og boðini undan hesum árinum vóru eisini, at liðið fyrst og fremst skal bíta seg fast í fremstu deildina aftur.

Móti Neistanum, sum roynir at halda fast í Stjørnuni í oddastríðnum, tóktist bitin tó vera heldur stórur undan dystinum sunnudagin. Ikki minst, um hugsað verður um, at munurin millum liðini var heili 18 mál, tá tey dystaðust fyrr í heyst.

### Ikki bert Ioana

Tað gjørdist talan ongan tíð um hesaferð. Hóast VÍF tíðliga í dystinum fekk ein dyggan smeit, tá Nikolina Eyðbjørnsdóttir noyddist av vøllinum við skaða, so slapp Neistin ikki uttan víðari avstað. Tær bláu vunnu sær tó eina leiðslu, sum tær megnaðu at halda fast um gjøgnum dystin, men eftir steðgin var fleiri ferðir heilt nær við, at VÍF vann seg upp á javnt.

Og tað varð ikki bert gjørt við skotstyrkini hjá Ioanu Rapa. Sjálvandi er hon mest týðandi spælarin á liðnum, men fleiri av yngru spælarunum megnaðu eisini væl at gera sær dælt av plássinum, sum varð skapt. Og í teimum løtum, tá Ioana var á beinkinum og hvíldi seg, tóktist spælið eisini ganga fult so væl. Hartil hevur Neisti ein mangul í skotstyrki, og tá tær sjáldan fingu kontraspælið at rigga heilt, kundu VÍF-verjan og ein stórspælandi Tomma Petersen halda stutt tjóður í.

Vantandi royndirnar hjá VÍF kostaðu tó, tá mest stóð á. Einar tríggjar ferðir kundu tær skotið seg heilt nær, men hvørja ferð varð møguleikin misnýttur, og tað revsaðu tær bláu.

### Ferðin má upp

Hóast tapið heldur VÍF á aftasta plássinum í deildini, so er einki at ivast í, at júst ein slíkur dystur kann økja um sjálvsálitið á liðnum, soleiðis at málið um at stabilisera seg kann røkkast.

Hjá Neistanum vóru stigini tey týdningarmestu, men tað er einki dulsmál, at spælið skal betrast, um tær vilja halda fast í oddaliðnum. Styrkin hjá liðnum er framvegis verjan og kontraspælið, men tað vilja vera dystir, har hetta ikki er nóg mikið í sjálvum sær. Og tá skotstyrkin ikki av sær sjálvum fær mótstøðuverjurnar út, eigur ferðin í gjøgnumbrotsspælinum at setast upp. Tað megnaðu tær bert í lítlum løtum hesaferð, men hesar løtur mugu leingjast, um plássið í oddinum skal haldast.

**FAKTA**

**VÍF-Neistin 20-23 (9-13)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ioana Rapa 10(3), Elisa Leo 2, Torgunn H. Hohansen 2, Heidi Joensen 2, Fríða Marjunardóttir 1, Linda Johannesen 1, Liljan Djurhuus 1, Rannvá á Rógvi
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 9(4), Unn J. Kragesteen 4(2), Rakul Magnussen 2, Ása á Neystabø 2, Anja Heinadóttir 2, Rakul Augustinussen 2, Elin Stakksund 1, Anna Clementsen 1
**Brotskøst:** VÍF 4, Neistin 8
**Útvísingar:** VÍF 1, Neistin 4
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

## Óttast nýggjan krossbandsskaða

Nikolina Eyðbjørnsdóttir, sum er ein av fáu spælarunum við royndum hjá VÍF, gjørdist ikki drúgv í dystinum móti Neistanum.

Heilt tíðliga í dystinum kom knæið skeivt niður á gólvið, og tað var ikki hugsingur um at halda fram at spæla.

Nikolina var burtur frá hondbóltinum í meira enn eitt ár við krossbandsskaða í høgra knæ. Og tað er ikki sørt, at hon óttast, at talan nú aftur er um skaða av sama slag. Bara í vinstra knæ hesaferð.

- Eg var á Landssjúkrahúsinum til kanningar longu leygarkvøldið, men tað einasta, sum tey fingu staðfest, var, at einki brot var. Tað hevði eg nú heldur ikki roknað við. Fyrst og fremst óttist eg, at talan er um nýggjan krossbandsskaða. Kenslan í knænum er so akkurát tann sama, sum hon var, tá eg sleit krossbandið fyrru ferðina, so lagið er einki serligt beint nú, sigur Nikolina.

- Eg skal so til kanningar hjá serlækna mánadagin. Ikki fyrr enn tá ber til at siga, hvat slag av skaða talan er um, men tað er bara at vóna tað besta, heldur hon.

**-mørk**

# Italski hópurin úttikin

**Landsliðsvenjari Roberto Donadoni hevur úttikið italska hópin, sum skal dystast ímóti Føroyum og Skotlandi**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Hvørki Alessandro Del Piero ella Filippo Inzaghi eru við í hópinum, sum 21. novembur skal dystast ímóti Føroyum. Dysturin verður leiktur kl. 20.30 á Alberto Braglia Stadion í Modena, og leikararnir, ið skulu manna italska liðið, eru hesir:

### Málverjar:
Gianluigi Buffon (Juventus), Gianluca Curci (Roma), Marco Amelia (Livorno)

### Verjuleikarar:
Fabio Cannavaro (Real Madrid), Daniele Bonera (Milan), Andrea Barzagli (Palermo), Fabio Grosso (Olympique Lyon), Giorgio Chiellini (Juventus), Massimo Oddo (Milan) Cristian Panucci (Roma), Gianluca Zambrotta (Barcelona);

### Miðvallarar:
Mauro Camoranesi (Juventus), Daniele De Rossi, (Roma), Massimo Ambrosini (Milan), Gennaro Gattuso (Milan), Simone Perrotta (Roma), Andrea Pirlo (Milan);

### Áleyparar:
Alberto Gilardino (Milan), Antonio Di Natale (Udinese), Vincenzo Iaquinta (Juventus), Fabio Quagliarella (Udinese), Cristiano Lucarelli (Shakhtar), Raffaele Palladino (Juventus), og Luca Toni (Bayern München)